Avreiðingar seinastu vikuna

Fisk, Hvalba

	pund
Hamranes	13.288
Caressa	16.162
Saturn	8.602

Nykur, Toftir

	Kg.
Jógvan Norði	17.303
Saturn	50.162
Sporið	37.870
3 deksbátar	2.394
4 deksbátar	728
6 deksbátar	3.707
2 deksbátar	1.023

Bátafisk, Strendur

	Pund
Morning Star	19.000

Frostvirkið

	Kg.
Astrid	4.003
Havgrímur	181
Oyggjarmúli	947
Bláhamar	2.514
Norðberg	6.895
Tunnafjall	1.074
Falkurin	77
Morning Star	1.609
Vesturroðin	67

Bacalao, Tórshavn

	Kg.
Báran	10.673
Harðaberg	8.286
Neptun	11.640
Skansatangi	32.282
Ørnin	27.785

Pf. Borgin, Sandi

	Pund
Havsøki	64.976
Columbus	71.270
Hvíthamar	720
Ørnin	902
RA	850
Sili	294
Snæranes	464
Árnaberg	604
Antares	18.976
Pollur	10.596

Norðis, Eiði

Tikið ímóti tils. 146 t.

Snarfrost

	Kg.
Hamraberg	19.671
Leivur í Hesti	45.028
Mars	30.720
Kúrberg	21.138

Klivar, Nólsoy

	Pund
Kapilsund	80.000
Margretha	90.000

Vestfisk

	Pund
Dalenni	120.000
Vesturleiki	135.000
Vestsøki	135.000

Lynfrost

	Kg.
Polarhav	52.486
Smaragd	32.158
Havørnin	25.314

Polarfrost, Vágur

	Tons
Nesborg	67,5
Varðborg	66

Vestmanna

	Pund
Gullberg	76.972
Heygadrangur	24.810
Norðbúgvin	19.622

J&O, Klaksvík

	Pund
Birita	2.500
Elbjørg	3.700
Glóðanes	3.050
Háenni	32.100
Svartaberg	630
Ester	17.300
Eysturhøvdi	9.000
Raðhamar	57.600
Núpur	1.070
Vesturroðin	1.300
Dorthea	1.000
Havgásin	150
Eyðrigafossur	150

Ísvirkið

52 avreiðingar tils. 26.912 kg.

Kósavirkið

	Kg.
Bjørgvin	8.859
Høvdarøðin	5.020
Nevið Reyða	4.490
Reynsmúli	9.215
Rógvan	183
Saksaberg	51.443
Slættaberg	51.443
Áarberg	10.571
Eldorado	1.566
Norðklett	12.526



Guttormur Djurhuus, stjóri á Marinplast, er hjástæddur, meðan fyrsti flótandi alihylurin verður royndur í India

Fyrsti flótandi alihylurin í India er føroyskur

Fyrsta royndin av aldum fiski í einum flótandi alihyli verður gjørd í India. Og tað er við einum føroyskum teknaðum alihyli.

Guttormur Djurhuus, stjóri á Marinplast er júst heimafturkomin av verð í India, har ætlanin er at fara undir framleiðslu av føroyskum bátum í plastfipuri.

Men tíð hevur so eisini verið til at hjálpa índarum við øðrum eitt nú fiskaaling, sum annars er ein rættiliga stór vinna í India í dag.

Teir ala fisk í jørðhylum og seta so eisini nógvan fisk út fyri at veiða hann seinni.

Guttormur Djurhuus sigur í samrøðu við Tíðindablaðið Sosialin, at índarar hava víst stóran áhuga fyri, hvussu vit í Føroyum reka fiskaaling.

Tamil Nadu

— Tað var tí náttúrligt at rigga ein slíkan flótandi alihyl til, sigur Guttormur og vísir á, at tann fyrsti hylurin úr plastfipuri longu er settur út í ein innsjógv nakað inni í landinum í statinum Tamil Nadu.

Hetta verður so gjørt sum ein roynd við almennum peningastuðuli. Fyrimunirnir við at nýta ein slíkan alihyl eru fleiri. Vatnútskiftingin er betri, vøksturin verður betri, tað ber til at ala meira intensivt og tað slepst í størri mun undan dálking og øðrum óhepnum árini.

Sjálvir eru índarar sera spentir, hvussu henda royndin fer at eydnast.

Tað er Guttormur sjálvur, sum hevur teknað hylin og lagt monnum lag á at gera hann burtur úr plastfipurslangum.

Í hesum hylinum eru í løtuni 7000 karpufiskar. Hetta er ein fiskur, ið er rættiliga vanligur eystanfyri, og nógv verður alt av honum. Hann veksur sera skjótt og gerst rættiliga stórur.

Ætlanin við hesi royndini er so at vita, um teir kunnu fáa 10 tons av karpu við at ala hana í 10 mánaðir.

Uppá fyrispurning um upprunaliga samarbeiði við føroysku bátunum kann hava ymiskt annað við sær so sum alisamvinnu sigur Guttormur, at tað eru nógvir og góðir



Teir eru í ferð við at rigga alihylin til. Hann verður gjørdur eftir eini tekning, sum Guttormur Djurhuus hevur gjørt